# FUNDARBÓK HJÁ
# VÁGS BÝRÁÐ 2013

| | | |
|---|---|---|
| **Fundur nr. 9**<br>**Tíð:** 28. oktober 2013 kl. 19.00<br>**Stað:** Kommunuskrivstovan | **Skrivari:** Petry Joensen | |
| **Fastir fundardagar:**<br>14. januar, 11. februar, 14. mars,<br>15. apríl, 30. mai, 17. juni,<br>19. august, 23. september,<br>28. oktober, 25. november,<br>19. desember | **Møttir:**<br>Allir býráðslimir | **Ikki á Fundi:** |

**1) Mál nr.: 13/00059**

**Frágreiðing um mál:**
Á býráðsfundi 23. september var samtykt til fyrru viðgerð, at játta 1.550.000,00 kr. av innistandandi sum eykajáttan til bygging av nýggjum barnagarði.

Fíggjarleiðarin vísir á at, nú endaligt er gjørt upp hvat byggingin av nýggja barnagarðinum hevur kosta tørvar eykajáttan uppá nevndu upphædd.
Samlaði kostnaðurin fíggjarárið 2013 er 3,35 mió. kr..

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

**2) Mál nr.: 13/00217**

**Frágreiðing um mál:**
Á býráðsfundi 23. september var staðfesti samtyktina frá 2010 um at gjalda Sp/f Torgið max. 200.000,00 kr. fyri ger av gongubreytini.
Býráðið ynskti samstundis, at Vágs kommuna í framtíðini kann gera sum ætla var, at binda hesa gongubreyt saman við gongubreytunum vestan og uttan fyri.
Somuleiðis samtykti býráðið til fyrru viðgerð at játta hendan peningin av innistandandi.

**Avgerð:**
Anna B. Samuelsen var ikki við í viðgerðini metti seg ógegnigan.
Einmælt samtykt.

Undirskriva:

**3) Mál nr.: 13/00233**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram, sakarmálið við Føroya Pedagogfelag.
Dómur var sagdur í málinum 1. oktober 2013, kærufreistin er úti 29. oktober 2013.
Niðurstøðan í málinum er m.a. soljóðandi:

“ …. Et krav om, at den daglige leder for en daginstitution udelukkende kan væra leder for 1 daginstitution eller 1 af flere geografiske adskilte institutionsenheder, følger ikke af ordlyden i §8, stk. 1, eller andre bestemmelser i daginstitutionsloven, og der findes ikke at være tilvejebragt oplysninger, som giver grundlag for en indskrænkende fortolkning.
Som følge af det anførte frifindes Vágs Kommune for sagsøgers første påstand.
……
Det følger af den almindelige forvaltningsretlige grundsætning om proportionalitet, at forvaltningen i forbindelse med personaleafgørelser skal vælge den mindst indgribende foranstaltning. Retten finder, at dette indebærer, at Eileen D. Simonsen, Sørin Richard og Unn Michelsen under de foreliggende omstændigheder, hvor kommunen umiddelbart efter opsigelserne nyansætter en række pædagoger, burde have været tilbudt fortsat ansættelse som pædagoger. ……
På den anførte baggrund har Eileen D. Simonsen, Sørin Richard og Unn Michelsen hver for sig krav på en økonomisk kompensation, der under hensyn til manglerne ved sagsbehandlingen i forbindelse med opsigelserne, ansættelsernes varighed og lønniveauet fastsættes til 75.000,00 kr. til hver.

Mentunarnevndin viðgjørdi málið 8. oktober 2013, og mælir til ikki at kæra niðurstøðuna men enda málið her. Fíggjarnevndin viðgjørdi hetta á fundi 17. oktober 2013, og samtykti einmælt at taka undir við Mentunarnevndini.

Tørvur verður á, at geva ein eykajáttan uppá 225.000,00 kr. til grein 5.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt ikki at kæra málið, og játta eykajáttan uppá 225.000,00 kr. av innistandandi.

Undirskriva:

**4) Mál nr.: 13/00237**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram, umsókn um skattafrælsi frá FC Suðuroy.
TAKS hevur sent Vágs kommunu hetta og vísir á, at TAKS-ráðið áðrenn avgerð verður tikin, skal fáa sær álit frá avvarðandi býráði.
Fíggjarnevndin viðgjørdi málið á fundi 17. oktober 2013 og samtykti einmælt, at mæla býráðnum til at viðmæla hetta.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at viðmæla at FC Suðuroy fær skattafrælsi.

**5) Mál nr.: 13/00252**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram, skriv dagfest 21. oktober 2013 frá fíggjarleiðaranum.
Fíggjarleiðarin vísir á, at avtala er við leiðsluna á Eldrasambýlinum, um at tey skulu boðað bókhaldinum frá hvønn mðr. hvør, ið skal hava rokning fyri at hava verið til umlætting. Hetta koyrir ikki sum tað skal, og ynskir fíggjarleiðarin at stramma verður upp viðvíkjandi øllum mannagongdum uppi á Eldrasambýlinum.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at taka hetta upp við leiðararnir og fáa skerpa mannagongdina viðv. fráboðan. Lógir og kunngerðir á hesum øki mugu haldast.

**6) Mál nr.: 13/00254**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram áheitan frá fíggjarnevndini um, at taka upp og staðfesta samtyktina frá undanfarna býráð um, at flyta rakstrarkostnaðin til nýggja hylin tá hann letur upp, og at verandi hylur verður niðurlagdur.
Samtyktin sum víst verður til er bræv dagfest 20. juni 2012 sent til John Hendrik Holm.

**Avgerð:**
Dennis Holm var ikki við í viðgerðini metti seg ógegnigan. Eydis Kjærbo leiddi fundin.

Eydis læs upp viðmerkingar frá fíggjarleiðaranum.

Einmælt samtykt at staðfesta samtyktina frá juni 2012.
Og seta gongd á arbeiðið við at fyrireika flytingina av starvsfólki, skúlabørnum ol.
Eisini verður heitt á teknisku umsitingina, at kanna eftir hvussu vegur og økið uttanum kann gerast. Skúlaleiðslan verður kunna um niðurstøðuna.

Undirskriva: